Vinnuráðstevna í Norðurlandahúsinum
24. mai 2007



Ein áhugaverdur dagur við

# William Jefferson Clinton og Hans Blix

24. mai 2007 skipar Føroya Arbeiðsgevarafelag fyri vinnuráðstevnu í Norðurlandahúsinum. Á ráðstevnuni fara fyrrverandi amerikanski forsetin, Bill Clinton, og formaðurin í Hópoyðingarvápnanevndini (WMDC), Hans Blix, at røða.

Umframt at limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag hava fingið møguleika at keypa atgongumerki í forsølu, verða atgongumerki nú seld í fríari sølu.

Røðurnar eru á enskum og vara umleið ein tíma hvør. Aftaná verða spurningar settir røðarunum. Tiltakið varar samanlagt umleið fýra tímar. Endalig skrá verður kunngjørd seinni.

Á ráðstevnuni verður eisini okkurt lætt til matna.

**Atgongumerki**
Sølan byrjar týsdagin 6. mars 2007 kl. 9.00, og kunnu atgongumerki bert keypast við at ringja á tel. 30 99 00.

Bert tvey atgongumerki verða seld fyri hvørja uppringing. Sølan heldur fram til útselt er.
Atgongumerkini kosta kr. 5.000.

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

Smærugøta 9A, FO-100 Tórshavn, Tel 30 99 00, Fax 30 99 01, industry@industry.fo, www.industry.fo